Heimarøktin

# 3 føst størv til nýggja stuðulstoymið hjá Stuðulsfólkaskipanini fyri vaksin í Suðurstreymoy

Stuðulsfólkaskipanin fyri vaksin fevnir um alt landið, og hevur til endamáls at veita sosialpedagogiska hjálp, fylgi, eftiransan og umsorgan. Málbólkurin er heimabúgvandi fólk millum 18-66 ár, ið hava munandi skerdan kropsligan og sálarliga virkisførleika, orsaka av sinnisligum brekum, heilaskaða, epilepsi, rørslutarni, tvørrandi ella vánaligum tosingarlagi, eru blind, sjónveik, deyv ella tunghoyrd.

Ætlanin við nýggja stuðulstoyminum, er at byggja upp ein tvørfakligan starvsfólkabólk, við pedagogum, ergoterapeutum, fysioterapeutum, sjúkraøktarfrøðingum, sosialráðgevum, sosial- og heilsuatstøðarum o.ø.

Endamálið við hjálparveitingunum er sum heild at fyribyrgja, at hin einstaki verður verri fyri. Endamálið er eisini, at tann einstaki skal hava møguleikar at fáa eitt betri lív.

**Stuðulsfólkaskipanin fyri vaksin ynskir at stuðla, ið m.a.:**

- Kunnu arbeiða sjálvstøðugt og einsamallir í heimi brúkarans og samstundis eisini kunnu átaka sær at arbeiða í einum øki, har tað ræður um intutión
- Vísa áhuga og virðing og samstundis vera professionellur
- Eru stuðlandi og hjálpa brúkaranum uttan at taka ábyrgdina fyri lívinum frá honum
- Hava eina positiva menniskjafatan
- Hava hug og hegni til at arbeiða í einum tvørfakligum umhvørvi
- Eru opin, virkisfýsnir og menningarkunnaðir
- Kunnu handfara og trívast við einum arbeiðsdegi, ið einki kann sigast um frammanundan

Størvini verða sett 01.03. 2004 ella skjótast aftaná.

**Stuðulsfólkaskipanin fyri vaksin kann bjóða:**

- Eitt spennandi arbeiðspláss við møguleikum at menna seg bæði persónleiga og fakliga
- Ein virkin tvørfakligur starvsfólkahópur
- Samávirkan á gerandisuppgávur
- Kunning í arbeiðinum og supervision

**Lønar- og setanartreytir:**
Talan er um 3 føst størv innan Heimarøktina og Serforsorgina og roknast má við, at arbeiðstíðirnar av og á eru skiftandi, dag-, kvøld- og vikuskiftisarbeiði.

Løn sambært avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.

Fleiri upplýsingar um størvini eru at fáa hjá sosialráðgeva Odu M. Johannsdóttir, pedagogi Fíu Jespersen og leiðaranum Regin Johansen, tlf. 354020.

Umsóknarfreistin er sett til fríggjadagin 23.01.2004, og umsóknir skulu sendast til:

**Stuðulsfólkaskipanin fyri vaksin**
Att: Regin Johansen
Niels Finsensgøta 28 - 2. hædd
100 Tórshavn




Gluggaglæma
Faroese Art & Craft
sí www.craft.fo

# Sjalskapping

*Kapping um –*
*vakrasta, snøggasta og smartasta*
*"føroyska sjalið anno 2004"*

Sjalið er vorðið hægsti móti nú á døgum, eins og tað var í 60´unum; tí bjóðar Gluggaglæma 2004 til sjalskapping. Endamálið er at eggja til nýskapan við íblástri úr gomlum føroyskum sniði/um. Lat tí hugflogið fáa frítt at fara, og send inn títt besta uppskot til kappingina um vakrasta, snøggasta og smartasta "føroyska sjalið anno 2004".

**Treytir**
Sjalið skal verða úr føroyskum tilfari. Vaksnamannastødd.

**Døming**
Ein dómsnevnd við 3 persónum dømir innsendu avrikini. Mett verður um: nýskapan við íblástri úr gamla føroyska sjalinum / bundnaturriklæðnum, nýtsluháttin av føroyska tilfarinum, hegni og handverksdygd.

**Virðisløn ir**
Latnar verða 3 virðisløn ir

*1. virðisløn kr. 5.000*
*2. virðisløn kr. 2.500*
*3. virðisløn kr. 1.000*

**Loynilig kapping**
Kappingin er loynilig. Navn, bústaður og telefonnr. hjá innsendaranum skal vera fjalt í einum hylki, sum er fest á sjalinum. Tá ið vinnarasjalini eru kosin, verða hylkini latin upp og vinnararnir funnir. Úrslitið av kappingini verður kunngjørt á Gluggaglæmu í Müllers pakkhúsi mikudagin tann 14. juli. Aftaná verður sjalsmótasýning. Sí skrá seinni.
Sjalini verða øll sýnd fram á Gluggaglæmu fram til 18. juli.

**Freist at senda inn: 15. juni 2004**
*(Poststemplað dato)*

**Sendið til:** Gluggaglæma
c/o Randi S. Vang
Niðaragøta 108
188 Hoyvík

FØROYA HEIMAVIRKISFELAG

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 3321, P/F Flakavirkið í Hvalba, 850 Hvalba.

**Stjórn:**
**Farin frá sum stjóri:** Jóhan Páll joensen, Ryggsvegur 5, 700 Klaksvík.
**Innkomin sum stjóri:** Mikkjal Hammer, 850 Hvalba.

*Skráseting Føroya tann 9. januar 2004.*

*Kristin Balle*




# Vágs skúli Lærarastarv

Vegna barnsburðarfarloyvi verður søkt eftir lærara 26 tímar/viku.

Starvið er tíðaravmarkað frá 26. januar til 30. januar 2004.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til skúlastjóran tlf. 373192.

Starvið verður lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið.

Umsóknir við ljósriti av prógvi og møguligum viðmælum skulu verða Skúlastýrinum í hendi seinast fríggjadagin 16. januar 2004.

**Skúlastýrið fyri Vágs skúla**
v/ Eilen D. Simonsen
925 Nes - Vágur

# Kunngerð

Sambært kunngerð nr. 32 av 18. mars 1998 fer løgtingsval fram

**Týsdagin tann 20. januar 2004**
**í fundarhølinum á Toftum**

**Atkvøðutíðin verður millum:**

**kl. 10.00–kl. 20.00 ella so leingi veljarar møta uttan steg.**

**Brævatkvøður:**
Veljarar, ið verða burturstaddir valdagin, kunnu í seinasta lagi dagin fyri valið greiða brævatkvøðu við at venda sær til kommunuskrivstovuna. Brævatkvøðurnar skulu vera valstýrinum í hendi innan valið byrjar kl. 10.00 tann 20. januar 2004.

Veljarar, ið vegna sjúku ella vantandi førleika ikki kunnu koma á valstaðið, kunnu velja heima í seinasta lagi dagin fyri valið við at boða frá til kommunuskrivstovuna – helst innan *kl. 17.00 mánadagin tann 19. januar 2004.*

**Valkort** skulu nýtast til valavgreiðsluna og valkortini verða send út við postinum til allar løgtingsveljarar, ið standa á vallistanum. Um onkur, ið heldur seg hava atkvøðurætt, ikki hevur fingið valkort, ella okkurt annað er komið skeivt fyri, skal verða sagt kommunuskrivstovuni frá sum skjótast.

*8. januar 2004*
**Valstýrið í Nes kommunu**

# Reingerðarfólk/ avloysari

## til barnaansingarstovnin inni á Bakka

Vegna ov fáar umsøkjarar, søkir Vágs kommuna av nýggjum eftir reingerðarfólki/avloysara til barnaansingarstovnin inni á Bakka at byrja skjótast til ber.

**Starvið umfatar:**
Reingering 2 tímar um dagin, og at verða avloysari fyri starvsfólkið.

**Lønarviðurskifti:**
Starvið er lønt samsvarandi sáttmála millum Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya og avvarðandi fakfeløg.

**Meira fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Unn Michelsen á telefon 37 33 83.

**Umsókn**
saman við upplýsingum um útbúgving, royndum og møguligum viðmælum skulu vera Vágs Kommunu í hendi í seinasta lagi 1. februar 2003.

Viðmerk á brævbjálvan »reingerðarfólk/avloysari«.

**Vágs kommuna**
**Mentanarnevndin**

# Kunngerð

## til løgtingsveljarar í Skála kommunu til løgtingsvalið 20. januar 2004

**Brævatkvøður**
Veljarar í Skála kommunu, ið sambært vallógina lúka treytirnar fyri at greiða brævatkvøðu, kunnu atkvøða á kommunuskrivstovuni í avgreiðslutíðini til og við 19. januar 2004.
Tey, ið vegna sjúku ikki eru før fyri at koma á valstaðin og sum ynskja at greiða brævatkvøðu heima, kunnu boða kommunuskrivstovuni frá á tlf. 441179 í seinasta lagi 19. januar 2004, kl. 15.00.

**Valkort**
Við hesum verður gjørt kunnugt, at til løgtingsvalið verða valkort send øllum veljarum í kommununi. Um onkur, ið heldur seg hava atkvøðurætt, ikki hevur fingið valkort, ella okkurt annað er komið skeivt fyri, skal vera sagt kommunuskrivstovuni frá í seinasta lagi 19. januar 2004 á tlf. 441179.

**Valstøð**
Løgtingsvalið fyri valstøðini í Skála kommunu fer fram á hesum støðum:

**Skála:** *í Pensionistahúsinum*
**Skálafirði:** *í skúlanum*

Atkvøðugreiðslan byrjar kl. 10.00 fyrrapart og heldur fram til kl. 20.00 ella so leingi veljarar møta uttan steðg.

**Skála Kommuna**

# Kunngerð

## um løgtingsval í Skopunar kommunu

Til veljarar til løgtingsvalið 20. januar 2004 í Skopunar kommunu:

Tað verður hervið gjørt kunnugt, at atkvøðugreiðslan fer fram á kommunuskrivstovuni týsdagin 20. januar 2004.

Atkvøðugreiðslan byrjar kl. 10.00 og heldur fram til kl. 20.00 ella so leingi veljarar møta uttan støðg.

Veljarar, ið sambært vallógini hava rætt til at nýta brævatkvøðu, kunnu atkvøða á kommunuskrivstovuni í vanligari avgreiðslutíð mánadag til og við fríggjadag millum kl. 11.00 og 15.00.

Tey, ið vegna sjúku ikki kunnu koma á valstaðið, kunnu velja heima við at venda sær til kommunuskrivstovuna á telefon 361349 ella til formannin í valnevndini Sigurd Bærentsen á tlf. 361189 innan kl. 15.00 tann 19. januar 2004.

Seinasti dagur fyri at greiða brævatkvøðu er **mánadagin tann 19. januar 2004.**

*Skopun, 8. januar 2004*
**Valnevndin hjá Skopunar kommunu**

**Landssjúkrahúsið**
Fo 100 Tórshavn

# Sjúkraøktarfrøðingur til A2 føðideildina

Á føðideildini **A2** er avloysarastarv sum sjúkraøktarfrøðingur á starvsbrøki 0,6 í náttarvaktum leyst til setan skjótast gjørligt fram til 31. august 2004, tó er møguleiki fyri, at starvið kann verða skiftandi kvøld- og náttarvaktir.

A2 er ein deild við plássi fyri 12 mammum við børnum, 4 barnakonum og einari neonatalari eind, har vit royna, at hvørt einstaka barnið saman við foreldrum fær so góða byrjan sum gjørligt í lívinum. Deildin er spennandi við nógvum avbjóðingum, tvørfakligum samstarvi, góðari upplæring, undirvísing, og hon hevur tilrættislagda innleiðsluætlan. Á deildini eru royndir og virknir starvsfelagar.

**Førleikakrøv:**

- prógv og góðkenning sum sjúkraøktarfrøðingur
- faklig vitan og royndir
- góð samstarvsevni
- fleksibul og kreativ/ur
- røkjuskapur
- hug til tvørfakligt samstarv

**Setanartreytir:**
Løn og setanartreytir smb. sáttmálan millum Felagið Føroyskir Sjúkraøktarfrøðingar og Fíggjarmálaráðið.

**Upplýsingar um starvið:**
Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Sólfríðu Helmsdal, virkandi deildarleiðara, telefon 31 35 40, lokal 167 ella til Ceciliu Vestureið, leiðandi sjúkraøktarfrøðing, lokal/kallara 499 ella e-post ceci@lsh.fo

Umsóknarfreistin er 26. januar 2004 kl. 12.00.

Skrivligar umsóknir við avriti av prógvum og viðmælum e.l. skulu sendast til

**Landssjúkrahúsið**
Starvsfólkadeildin
FO 100 Tórshavn

# Almennur

politiskur fundur verður í skúlagarðinum í Trongisvágs skúla sunnukvøldið 11. januar kl. 19.00.

**Valevnini**

**Húsasmiðurin Spf**
hevur broytt navn sítt til:

**EM/Húsasmíð Spf**
**v/Erik Møller, byggimeistari**
**FO-240 Skopun - Tel.: 361977/220387**

Alt byggiarbeiði frá tekning til tekju